# EYSTUROYAR DANSIFELAG
## Dansiveturin 2024/25
Dagbók, hvat vit kvøða o.t. Aftur í ár fara vit at føra dagbók, soleiðis at tað sæst, hvat vit í Eysturoyar dansifelag fáast við og kvøða.
Skrivarin. Jens Dalsgaard.

**Dagbókin 14. kvøld á vetrinum, 07.feb 2025**
**32 fólk.**
*Geyti legði ørv á strong,*
*Guð var honum við,*
*so skeyt hann ta lítlu nøtu,*
*hin stóð eftir kvirr.*

Føroyingar, sum her nú koma saman, Ivan.
Stærke Tidrik, Leivur.
Geyti Áslaksson, annar partur: frá 41. ørindi, Jóannes.
Ribold var en grevesøn, Kristian.
Kaffi og prát
Vaagen, Anfinnur.
Silvurlín, Kristian.
Stórhvalagildið, Ivan.

30 fólk ella meir gevur góðan dans, og so var eisini hetta kvøld. Geyti Áslaksson verður ikki ofta kvøðin her, næstan ongantíð, og tí dugdu fá við, men vit lurtaðu væl, og týðiliga varð kvøðið. Skiparin fekk góða hjálp sunnan av landi, og tað gjørdi dansin enn betri.
Jú, góður dansur, bæði dramatiskur og stillførur. Ein góð blanding.

**Dagbókin 13. kvøld á vetrinum, 31.jan 2025**
**í Haraldssundi. 20 fólk frá okkum, 80 fólk tilsamans.**
*"Har kom fram ein vænur selur*
*- so greiðir frøði frá -*
*úr selabúnað' moyggin fór,*
*hon føgur var at sjá."*

Kópakvæði, Jóngerð Kl.d
Kong Sverke, Jóannes Ey.d
Jomsvíkingar, Annika, Kl.d
Harpuríma, Kristjan, Ey.d
Gudbrandskvæði, Jóannes, Kl.d

Streingirsvísa, Anfinnur, Ey.d
Jákupsa skegg, Ólavur, Kl.d
Herr Sinklar, Jóna, Kl.d
Brestiskvæði, Jóannes, Kl.d
Ungersvend bad sin flikke, Kristian, Ey.d
Fiskerpigens sang, Elin Maria, Norðstr
Torkilsdøtur, Annika, Kl.d
Tá eg verði stórur, Jóngerð, Kl.d
Tjúgundi biðil, Jón Róð, Ey.d
Leivskvæði, Ivan, Ey.d
Stolt Signhild, Jóngerð, Kl.d
Í Gøtu ein dag, Kristian, Ey.d
Føroyingar sum her nú koma saman, Jóngerð, Kl.d
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian, Ey.d
Ólavur Riddararós, Jóannes, Ey.d
Vælkomnir føroyingar, Ivan, Ey.d
Á Dannimarkar fløtum, Jóngerð, Kl.d
Nú gerast kvøldini myrk og long, Ólavur, Kl.d.

Nú eru tað nógv harrans ár síðani, at vit í Eysturoyar dansifelag fyrstu ferð vóru í Haraldssundi til kyndilsmessudans. Tað hava altíð verið góð dansikvøld, og hesaferð var tað einki undantak. Hóast vit ikki vóru so nógv sum onkuntíð, slitnaði dansurin ikki sundur. Vit takka haraldssundsfólki fyri blíðskap.
Ps. Vit takka eisini Klaksvíkar dansifelag fyri blíðskapin á veg norð. jd.

**Dagbókin 12. kvøld á vetrinum, 24.januar 2025**
**Aðalfundur. 24 fólk.**
*Op da stode de kæmper,*
*de bade sadle deres heste,*
*meldte det Vidrik Verlandsøn:*
*"I sadle mig den bedste."*

Skráin var tann vanliga: frágreiðing frá formanninum og øðrum áltitisfólki og val. 3 av 5 nevndarlimum stóðu fyri vali. Nevndin er tann sama, uttan tað at Anna Maria Midjord kom inn aftur, og Kristian Jacobsen er nú eykalimur.
Nevndin skipar seg seinni.
Eftir ein góðan kaffimunn fóru vit at kvøða.

Her nógv er at gera, Kristian
Blakman konge, Jóan Petur
Gáturíma, Kristian
Grindavísan, Ivan
Det er i nat en vaagenat, Kristian

Í Gøtu ein dag, ingrid.
jd

**Dagbókin 11. kvøld á vetrinum, 17.januar 2025**
**34 fólk.**
*Rudis átti ein rumpuhvítan hest,*
*hann reið til Betlaheim, sum hann kundi best.*

Norden for Trondhjem, Jón Rói
Jónsvíkingar, Ivan
Ved Kristiansand, Jóannes
Runsivalsstríðið, 70 ørindir, Jón Rói
Kaffi og prát
Rutisarvísa, Kári
Herr Sinklar, Eli
Donsk vísa, skillingsvísa? Jón Rói
Leivur Øssursson, Ivan
Signhild og dvørgurin, Kári
Vi hugge med kårde, Jón Rói
God nat og farvel, Jón Rói.

Ps. Komandi kvøld er aðalfundur, og vit byrja kl 21.00 stundisliga Aftaná kvøða vit fyrst Stærke Tidrik og Blakman.
jd

**Dagbókin 10. Kvøld á vetrinum, 10.januar 2025**
**í Glyvr'Hanusarhúsi, Norðragøtu. 35 fólk.**
*"Gud Fader han sidder i Himmerig,*
*han taler til engelen så trøstelig.*
*Mig kedes ved at leve, så længes nu mig" *)*

Ólavur Riddararós, Hanna
Vaagen, Anfinnur
Ribolt han er en grevesøn, Kristian
Kaffi og hugni
Nord-Amerika, Jón Rói *)
Tá eg verði stórur, Jóan Petur
Hvor bølgen ruller, og hvor stormen suser, Kristian
Í Gøtu ein dag, Ingrid
Fótbóltstátturin, Kristian
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian
Kjartan Ólavsson, Jón Rói **)
Jeg ser så mangt et orlogsskib, Kristian

Gud Fader han sidder i Himmerig, Jón Rói ***)

Dansurin gekk væl, og stemningurin var góður, sum tað vanliga er. At fleiri yngir og lokal vóru við, gjørdi eisini sítt.

*) Hesaferð skipaði Jón Rói Kjartan Ólavsson við einum lag, sum hann og Kristian hava funnið í bandasavninum hjá Útvarpinum, eitt lag sum Marius Jóannesarson, kvæðakempan í Funningi brúkti.

**) Nord-Amerika er eitt slag av dansispæli, sum er kent úr Dali. Ein av okkara fólki fekk Jón Róa at skipa, og tað var stak festligt.

***) Ein andalig vísa, sum Kristian og Jón Rói hava lært seg úr bandasavninum. Hon er ikki at finna í okkara kvæðabók enn, men í Hundredesyv-visebogen er hon nr 76. Har sæst, at Albert Djurhuus hevði hana frá einum mikinesmanni, Karl Sivertsen. Vísan er frá fyrst í 18. Øld.

jd

**Dagbókin 9. Kvøld á vetrinum, 01.januar 2025**
**8 fólk.**
*"Lítið ansast regn og aldubrotið,,*
*tá ið blóðið rennur heitt og lætt;*
*væl man líva monnum vadmalskotið,*
*sum tær ungu moyggjar virka rætt."*

Føroyingar, sum her nú koma saman Ivan
Sambandsfall. Tóta
Bøhmerlandsdronningen. Jóna
Ólavur Riddararós, Sverri

Aftur hesaferð sum í fjør, vóru koyrilíkindini sera vánalig, og gjørdi hetta ivaleyst sítt til, at so fá fólk møttu hetta kvøldið. Sambært skránni, skuldu vit fara upp á gólv kl. 20.30, men klokkan nærkaðist 21.00 áðrenn tey fyrstu komu. Tá ið klokkan var blivin umleið 21.30 vóru vit átta fólk og vit hildu, at vit máttu royna at dansa eitt sindur, so at tey sum vóru komin ikki komu til fánýtis.
Vit fingu okkum siðani ein drekkamunn við góðari køku afturvið, og einum góðum práti. Vit ætlaðu at fara upp á gólv aftur, men yngsti skiparin noyddist at fara til hús, tí at hann skuldi í skúla dagin eftir, og tá ið foreldrini fóru við, var hugurin hjá teimum sum eftir vóru so mikið lítil, at vit avgjørdu at fara til hús.
Ein hugnalig løta, hóðast alt, hjá okkum fáu sum møttu hetta kvøldið.
Formaðurin
Ps. Fríggjakvøld tann 10.jan eru vit í Norðragøtu, Glyvr'Hanusarhúsi. Síggjast!
jd

**Dagbókin 8. kvøld á vetrinum, 13.dec. 2024**
**Á Strondum. 25 fólk**
*"Hann kom ferðandi heim á Strendur*
*at royna sínar stóru og sterku hendur."*

Føroyingar, sum her nú koma saman, Ivan.
Herr Sinklar, Eli Hansen.
Sambandsfall, Joen Carl.
Har bylgjan leikar fram við Íslands strendur, Joen Carl.
Kaffihugni.
Fótsbóltstátturin, Ivan.
Strandatáttur, Joen Carl.
Stórhvalagildið, Ivan; (lag.: Nú gerast kvøldini myrk og long).
Jákup á Møn, ca 90 ørindir, Joen Carl.
Ungersvend bad sin flikke, Jóna.
Vaagen, Ivan.

Hetta var síðsta dansikvøld í fyrru helvt av vetrinum. Vit byrja aftur nýggjárskvøld kl 20.30, og tá plaga vit at lata felagnum kr 50,- men børn og ung gjalda ikki.
Gleðilig jól!
jd

**Dagbókin 7. Kvøld á vetrinum, 06.dec.2024**
**Í Funningi. 35+ fólk.**
*”Er her imellem den stride strøm,*
*vil børen ikke med os stå;*
*da hugge vi ned den store skov,*
*vi gøre deraf en bro.”*

Jeg ser så mangt et orlogsskib, Kristian.
Jákupsa skegg, Petur Skeel.
Hjalmar og Hulda, Kristian.
Kaffi/te og prát.
Spanialand og Myklegård, Hans og Jóna J.
Engang det sig nu hændte, Kristian.
Bøhmerlandsdronningen, Jóna.
Jákup á Møn, fyrsti triðingur, Andreas S.
Signhild og dvørgurin, Kári.
Ungersvend bad sin flikke, Jóna.

Jytta og Jóhann høvdu latið upp og kókað kaffi, so vit komu til ‘búgvið borð og skorin klæðir’.
Beint eftir kl 21 trein Andreas Sigurstein í dyr við einum valalið úr Tøkum lætt. Tá vistu vit, at hetta fór at verða eitt gott dansikvøld. Úr Funningi komu fleiri – onkur kvæðakempa eisini, og so okkara fólk. Jú, kvøldið var bjargað.
jd

**Dagbókin 6. Kvøld á vetrinum, 29.nov. 2024**
**Dansispøl o.a. 21 fólk.**
*"Vanten de satte på årelommen,*
*med kraft fik de båden i gang,*
*da de for Skansetangen var kommen,*
*de sang en gudelig sang."*

Fótbóltstátturin, Kristian.
Grindavísan, Høgni.
Stærke Tidrik, Leivur.
Kaffi og prát.

Dansispøl tók Kristian sær av: Gomluketu og Bandadansi. Serliga var tað Gamlaketa, sum bleiv dansað eina góða løtu.
Gudbrandskvæði, Jóan Petur.

Nb: Funningskvøld.
Komandi dansikvøld, tann 06.des. eru vit í dansistovuni í Funningi. Vit byrja stundisliga kl 21.00, og í steðginum fæst kaffi og te.
Øll eru vælkomin í dans, og tað kostar einki Á skránni eru tvær vísur, sum hava verið kvødnar í Funningi: "Jeg ser så mangt et orlogsskib" og Spanialand og Myklagård", men vit kvøða sanniliga eisini lætt og kent.
jd

**Dagbókin 5. kvøld á vetrinum, 22.nov 2024**
**Tema: Táttakvøld, vit kvøða stutt og lætt. 27 fólk.**
*"Hvat vilja teir, hvat skilja teir, sum aldri stóðu har,*
*ið stormur hvein og bára breyt, og alt í roki var.*
*Eitt er at stýra pennaskafti, lukkan, annað er*
*í sjóroki og kavaódn at stýra millum sker"*

Vælkomnir føroyingar her í vási, Ivan
Nú gerast kvøldini myrk og long, Jón Rói
Tá eg verði stórur, Jóan Petur
Í Gøtu ein dag, Høgni
Her nógv er at gera, Kristian
Mær dámar bjór og brennivín, Jóannes
Viðjartrotið, Jón Rói
Flóvin Bænadiktsson, Høgni
Kaffi, kakur og prát
Eg havi verið fermur og kringur, Jóannes
Ole Morske, Leivur
Tjúgundi biðil, Anfinnur
Dansevise, Kristian
Áttamannafarið, Jens
Vit fáa tevatn og breyð, Anfinnur
Har bylgjan leikar, Høgni
Syv år er det siden, Sanna og Andras
Jeg var så ung og glad for alt i livet, Kristian
Mallebro, Jóan Petur
Eg átti mær eina húgvu, Jón Rói
Stórhvalagildið, Ivan.

Vit hava havt temakvøldið "Vt kvøða stutt og lætt" - onkuntíð "Táttakvøld" - á skránni síðani 2016, og tað hevur riggað væl hvørjaferð. Sjáldan hevur kvæðalistin verið so langur sum hesaferð.
jd

**Dagbókin 4. kvøld á vetrinum, 16.november 2024**
**Í bygdarhúsinum í Leirvík, 55-ára føðingardagur hjá felagnum. 135 fólk í veitslu.**
*"Aftur sigla Tístrams menn*
*við so lítið geingi,*
*bæði eldur og brúnur roykur*
*logar um teirra streingir."*
Til veitsluna vóru boðin trý feløg: Dansifelagið í Havn, Norðstreymoyar dansifelag og Klaksvíkar dansifelag. Vit skuldu vera 145 fólk, men veðurgudarnir skikkaðu sær ikki væl, og av tí grund settust nøkur aftur.

Røður:
Formaðurin
Pól Mikkelsen, Klaksvíkar dansifelag
Elin Maria Olsen, Norðstreymoyar dansifelag
Birgir Djurhuus, Dansifelagið í Havn
Hanus Kamban
Bynne Lamhauge

Hafburd konge og Sivar konge, Kristian, Ey. dansifelag
Fípan fagra, Birgir, Klaks. dansifelag
Kong Hans, Gunnar, Dansif. í Havn
Dvørgamoy I, Elin Maria, Norðstr. dansifelag
Blakman konge, Jóan Petur, Ey. dansifelag
Gudbrandskvæði, Jóannes, Klaks. dansifelag
Brestiskvæði, Kjartan Atlason, Dansif. í Havn
Streingirsvísa, Eydna, Norðstr. dansifelag
Tístramstáttur, Jón Rói, Ey. dansifelag
Vaagen, Fróði Skúvadal
Jómsvíkingar, Annika, Klaks. dansifelag
Teir sigla so væl sín fríða knørr, Kristian, Ey. dansif.
Vi hugge med kårde, Jón Rói, Ey. dansif.
Herr Sinklar, Jona, Klaks. dansif.
God nat og farvel, Kristian, Ey. Dansif.

Nú var klokkan gott tvey og nøkur heilt fá fólk vóru eftir, og út í gangin skipaði Kristian ta gomlu skilnaðarvísuna “God nat og farvel”, sum Hans David Matras yrkti í 1851. Lesið um hana á www.eystdans.dk

Tey trý feløgini skulu fáa stóra takk fyri, at tey komu so manssterk á veitslu hóast ringt veður.
jd

**Dagbókin 3. Kvøld á vetrinum, 08.nov 2024**
**32 fólk.**
Norden for Trondhjem, Jón Rói.
Finnbogaríma, Anfinnur.
Der går dans på Ribergade, Leivur.
Hugnaprát, kaffi.
Herr Zinklar, Kristian.
De røvere tolv, Jóan Petur.
Ranild beder lægge sadel på hest, Kristian.
O, du yndige dame, du dejlige mø, Jón Rói.
jd

**Dagbókin 2. kvøld á vetrinum, 02.nov 2024**
**Tema: brúðardansur. 40 fólk.**
Bøhmerlandsdronningen, Jóna.
Fisken tager sin føde i vand, Ivan.
I ærlige brudefolk, Jóan Petur.
Kaffisteðgur.
Steintóra G. Joensen, sóknarprestur, hugleiddi um brúðardans – bæði út frá Halgubók og brúðsrvísuni hjá IPG.
Harra Pætur og Elinborg, Kristian.
Leivur Øssursson, Kristian.
jd

**Dagbókin 1. Kvøld á vetrinum, 25.okt 2024**
**29 fólk í dansi.**
*"Rólant hann skal formaður vera,*
*reystastur er av dreingjum,*
*skulu so høgga títt um stund*
*og standa væl og leingi".*

Hin føroyski dansurin, Ivan formaður
Stolt Signhild, Jón Rói
Herr Sinklar, Jóannes
Flóvin bænadiktsson, Ivan.
Kaffisteðgur. Formaðurin greiddi frá ymsum um hendan veturin.
Runsivalsstríðið, 27 tey fyrstu ørindini, tvær ferðir, Jón Rói
Brestiskvæði, Jóannes.
Mallebro, Jón Rói.
jd